

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 12 - 2012

# Umhugsa oljuvirksemi á Svalbard

Í sambandi við at hugsanir um at skipa Svalbard sum ein sokallaðan heimsarv, hevur norska stjórnin biðið oljustýrið kanna, hvørjar avleiðingar ein tílík skipan kann fáa fyri møguleikarnar at flyta olju og gass umvegis Svalbard, um so verður, at tann norðari parturin av Barentshavinum verður latin upp fyri oljuvinnu. Ivar Vigdernes, sum er politiskur ráðhgevi í olju- og orkumálaráðnum í Oslo, váttar fyri tíðindastovuni NTB, at tey arbeiða við at skráseta partar av Svalbard sum heimsarv á listanum, sum UNESCO hevur yvir slík støð. -Í sambandi við hetta er tað náttúrligt at taka tað við, at tað kann koma upp á tal at brúka Svalbard í sambandi við eina komandi oljuvinnu í Barentshavinum. Her kann talan verða um flutning, útgerð og støðir á landi, sigur Ivar Vigdernes við norsku tíðindastovuna. Tosa eisini um friðing Samstundis sum kannað verður, hvussu Svalbard kann brúkast í sambandi við oljuvinnu, er eitt uppskot um at friða nøkur øki eystantil á Svalbard farið út til hoyringar, og tað er ikki fallið í góða jørð í vinnuni. -At friða havleiðirnar eystan fyri Svalbard er geopolitiskt, ídnaðarliga og búskaparliga í stórari andsøgn til norsk áhugamál, sigur Johan Petter Barlindhaug, nevndarformaður í North Energy við NTB.